Almannaverkið tørvar ein nýggjan bil, sum kann rúma 7 vaksnum (ikki koyristól).

Meginreglan er at allir bilar hjá landinum skulu verða el drivnir, og tað halda vit okkum til. Vísir tað seg, ikki at bera til at fáa ein nøktandi el drivnan, so hevur bensin/diesel áhuga.

Treytirnar eru fylgjandi:

1. Bilurin skal nýtast í samband við at borgarar sum fáa eina tænastu frá Almannaverkinum, skulu koyrast
2. Bilurin skal eisini nýtast til at koyra millum bygdir í øllum veðri, og tí skal bilurin vera egnaður til tað. Her verður hugsa um motorkraft og koyrieginleikar.
3. Bilurin skal kunna rúma 7 vaksnum persónum
4. Almannaverkið krevur at veitarin stendur fyri allari service, eftirlit og líknandi, á egnum verkstað, ella á verkstað sum veitarin hevur formella samstarvsavtalu við
5. Levering: Bilurin skal leverast Almannaverkinum, seinast í januar 2026, helst fyrr
6. Litur: Bilurin skal verða koksgráur / myrka gráur. Svart ella hvítt gongur, men gevur lægri stig
7. MVG skal upplýsast
8. Virðisgjald skal upplýsast

Keyparin tilskilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnu tilboðini eins og ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum.

Upplýsast skal, at tað kann henda at Almannaverkið hevur tørv á fleiri bilum tá ið vit taka av tilboð, og tá tilskilar Almannaverkið sær rætt til at keypa fleiri bilar, uttan at tað verður boðið út av nýggjum.

Tilboðini verða viðgjørd og sammett av keypara. Niðurstøðan um, hvat av tilboðunum – um nakað – tikið verður av, verður grundað á eina heildarmeting við denti á tey viðurskifti, sum eru nevnd í hesum skrivi.

Almannaverkið ynskir at royna bilin innan avgerð verður tikin. Hetta fyri at kunna meta um besta bilin.

Sum meginregla leggur Almannaverkið seg eftir at keypa bíligasta bilin. Tó loyva vit okkum, at taka av einum dýrari bili, um Almannaverkið fyri ein minni prísmun fær ein betur bil, í mun til góðsku og endamál.

Soleiðis vera tilboðini vektaði:

- Prísur 60 %
- Egnaður til endamál 20 %
- Góðska 20%

Umboð frá veitara eru vælkomin at seta fram spurningar um veitingarætlanina og tilboðsgrundarlagið í síni heild, um ávís viðurskifti ynskjast greinað nærri. Slíkir spurningar skulu so vítt møguligt verða settir fram og annars viðgjørdir skrivliga við tí fyri eyga lættari at kunna skjalprógva samskiftið.

Spurningar skulu vera skrivligir og sendast til janusf@av.fo. Keypari metir seg kunna geva svar, um tikið verður av tilboðnum ella ikki, umleið 1 viku, eftir at tilboðsfreistin er farin.

Tilboðini skulu verða Almannaverkinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 21. november 2025 kl. 10.00

Tilboðið skal sendast við telduposti til janusf@av.fo

Vinarliga

**Janus H. í Funningsstovu**

Deildarleiðari